ítróttur

Nr. 204 • mikudagur • 26. oktober 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

FM í talvi fyri børn og ung

Aftur í vetur skipar Talvsamband Føroya fyri FM-kapping. Kappast verður í fimm bólkum, og er talan samstundis um úttøkukapping til NM-kappingina

TALV
tíðindaskriv

Luttøkan til ungdómskappingarnar hevur verið alsamt vaksandi. Aftur í vetur fer Talvsambandið at finna fram til besta telvaran

Talvsamband Føroya skipar aftur í vetur fyri Føroyameistarakapping fyri børn- og ung einstaklingar í talvi. Kappingin verður skipað í 5 ymiskum aldursbólkum, og er samstundis úttøkukapping til NM-kappingina 2006.

Kappingin um FM-heitið verður í somu aldursbólkum sum til NM-kappingina:

A - bólkur:
Telvarar føddir 1986-88

B - bólkur:
Telvarar føddir 1989-90

C - bólkur:
Telvarar føddir 1991-92

D - bólkur:
Telvarar føddir 1993-94 og

E - bólkur:
Telvarar føddir 1995 og seinni.

Skipað verður fyri trimum kappingum, har tvær tær fyrstu eru úttøkukappingar til endaligu finaluna. Kappingarnar í ár verða hildnar í Vestmanna, Vágoynni og í Havn. Í teimum báðum fyrru kappingunum verða átta umfør telvað, har telvararnir hava 10 minuttir hvør til hvørt talvið.

Í seinastu kappingini, sum verður í Havn, er talan um finalu. Har eru í hvørjum bólki tey átta, sum hava staðið seg best í hinum báðum kappingunum, og síðani spæla øll móti øllum. Altso sjey talv hvør. Tíðin til hvørt talvið verður tá eisini longd í 30 minuttir.

Tey trý fremstu í hvørjari kapping fáa heiðursmerki, umframt at steyp eisini verða latin í finalukappingini. Hartil sleppa tey bæði fremstu í hvørjum bólki eisini við til Norðurlendsku meistarakappingina fyri einstaklingar. Hendan verður hildin í Finnlandi í februar mánaði.

Tilmelding til kappingina fer fram á www.faroechess.com.

Fótbólts - gallaveitsla 2005

Fótbóltsgallaveitslan 2005 verður í Bygdarhúsinum í Leirvík tann 29. oktober kl 19.30.

Veitslan verður skipað sum ein afturlatin veitsla fyri 1. deild hjá monnum og kvinnum, dómarum, nevndum í feløgunum og nevnd og starvsfólki hjá FSF .

Á veitsluni verða kosnir ársins leikarar, ársins stjørnuskot, ársins málmaður og ársins venjari hjá bæði kvinnum og monnum, og sum nakað nýtt verður eisini farið undir at kjósa ársins dómara.

Kostnaðurin fyri tiltakið er kr. 350 fyri hvønn. Íroknað prísin er vælkomstdrykkur, borðhald við forrætti, høvuðsrætti og dessert og kaffi og 2 øl/sodavatn til hvønn. Undir borðhaldinum verður eisini felagssangur og gott undirhald við Magna Poulsen.

Aftaná borðhaldið spæla SHOWMENN til dans. Dansurin er bert fyri gallaveitslu luttakarunum.

Tilmelding á teldupost galla@gigotu.fo ella við sms á tlf. 585051/223667. Avmarkað atgongd.

Kostnaðurin á kr. 350 skal verða goldin á konto í Føroya Sparikassa 273.329.5 áðrenn leygardagin 22. oktober.

Gøtu Ítróttarfelag

Tiltakið er stuðlað av: Atlantic Airways • Skipafelagið Føroyar • Statoil • Samkeyp • Tryggingarfelagið Føroyar • Føroya Tele • Sosialurin